Álit

í

løgtingsmáli nr. 126/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (At taka loftrúm og flogferðslu undir føroyskt ræði)

Høgni Hoydal, tingmaður, hevur vegna Tjóðveldi lagt málið fram 5. mars 2020, og eftir 1. viðgerð tann 9. mars 2021 er tað beint Uttanlandsnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 14., 16. og 21. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Atlantic Airways, Vága Floghavn, Sámal Ímundarson og landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í tríggjar minnilutar.

Ein minniluti (Bill Justinussen, Jaspur Langgaard og Frimodt Rasmussen) hevur hesar viðmerkingar:

Yvirtøka av loftrúmi og flogferðslu er ikki eitt ókent mál í politisku skipanini.

Í 2012 varð soljóðandi uppskot til samtyktar, samtykt á Løgtingi:
”*Heitt verður á landsstýrið um at útgreina og kanna møguleikarnar fyri at yvirtaka loftrúmið yvir Føroyum til føroyska umsiting,og síðani at taka upp samráðingar við ríkisstjórnina um yvirtøku,og at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið um skipan av føroyskum loftrúmseftirliti.”*
Eitt av endamálunum við uppskotinum var *”at yvirtaka umsitingina av loftrúminum yvir Føroyum, og harvið skapa 50-100 nýggj vitanartung arbeiðspláss í Føroyum, og styrkja um og menna føroyska flogvinnuøkið sum heild.”*

Í november 2013 læt ein arbeiðsbólkur, mannaður við embætisfólki úr Føroyum og Danmak, úr hondum frágreiðingina “Beskrivelse af luftfartsområdet i relation til Færøerne”.

Undanfarna samgonga hevði yvirtøku av loftrúmi og flogferðslu á skrá.

Samanumtikið er niðurstøðan, at hóast tað ikki tykist at hava skortað politiskur vilji í Føroyum at taka yvir loftrúm og flogferðslu undir føroyskt ræði, hevur tað higartil ikki eydnast. Orsakirnar eru ikki allýstar. Men uttan iva eru tær fleiri og fleirtáttaðar. Ein orsøk tykist vera, at loftrúm og flogferðsla í okkara øki er sera væl umsitið av íslendskum loftferðslumyndugleikum. Frá ICAO verður tí ikki mett, at nøkur orsøk er til at gera nakrar broytingar í umsitingini av loftrúminum og flogferðsluni.

Føroysku sjónarmiðini byggja á inntøkumøguleikar, sjálvræði og førleikamenning. Hesin minnilutin er samdur um, at landsstýrismaðurin og umsitingin framhaldandi eiga at arbeiða við at fyrireika og kanna møguleikarnar at yvirtaka loftrúm og flogferðslu. Nevndini er upplýst, at millum 10 og 15 størv eru á økinum, um tað verður yvirtikið. Umsiting av flogferðsluni í okkara parti av loftrúminum verður fíggjað við cost recovery (kostnaðarendurgjaldi). Tí er ikki grundarlag fyri at halda, at yvirtøka av loftrúmi og flogferðslu kann gerast ein inntøkukelda til at fíggja annað enn tey størv og ta útgerð, sum eru beinleiðis tengd at uppgávuni.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Ein annar minniluti (Annika Olsen og Brandur Sandoy) hevur hesar viðmerkingar:

Hóast nógvar samgongur hava sett sær gylta málið at yvirtaka málsøkið loftferðslu, hevur hetta ikki borið á mál enn.

Tað liggja nógvir møguleikar hjá Føroyum at yvirtaka loftrúmið, bæði í førleikamenning, størvum og inntøkum í at menna økið enn meira. Nevndin hevur fingið upplýst, at millum 10 og 15 størv eru í økinum, um tað verður yvirtikið.

Tað er tó greitt, at tær inntøkur, ið koma frá flogførum í føroyskum loftrúmi skulu brúkast til at menna útgerð og menning av viðurskiftum, ið hava við størv ið eru atknýtt yvirtøkuni, tilbúgving v.m.

Undir viðgerðini er komið fram, at neyðugt er at fáa nýggja og størri bjargingartyrlu. So leingi málsøkið ikki er føroyskt, eiga danir at fíggja hesa útgerð.

Eisini er undir viðgerðini komið fram, at ein loftferðsluradari á Sornfelli er avgerandi fyritreyt fyri, at Føroyar kunnu yvirtaka loftferðsluna kring Føroyar.

Føroyar liggja sera væl landafrøðiliga staðsettar í flogferðsluhøpi, tí jetstreymarnir gera, at fíggjarligi áhugin hjá flogfeløgum at flúgva yvir Føroyum er stórur.

Sambært Chicago-konventiónini hevur eitthvørt land fullan og eksklusivan rætt yvir sínum egna luftrúmi yvir sínum øki, sum í hesum føri verður nágreinað út á 12 fjórðingar úr grundlinjuni runt Føroyar. Innanfyri hetta økið kunnu Føroyar altíð upprætta sítt egna FIR (Flight Information Region). Nakað er tó sum bendir á, at flogfør møguliga fara at seta kósina uttanfyri hetta lítla økið, um tey skulu til at gjalda nógv meira fyri hetta.

Í nevndarviðgerðini er komið fram, at fyri at økja um føroyska FIR-ið, soleiðis at øll flogførini, sum í dag flúgva yvir um Norðuratlantshavið, verða at flúgva í føroyskum øki, er neyðugt við samráðingum við ICAO, um at broyta avtaluna um Norðuratlantsøkið. Útgreinandi arbeiði skal til, áðrenn hesar samráðingar fara í gongd, og skal umsóknin frá Føroyum innihalda útgreinaðar tekniskar, operationellar og fíggjarligar grundgevingar fyri, hví vit sum land ynskja at yvirtaka ábyrgdina av hesum øki.

Onki verður nevnt í samgonguskjalinum frá 2019 um yvirtøku av hesum málsøki, og metir hesin minnilutin heldur ikki, at tað hevði verið rætt at yvirtikið málið við einum andstøðuuppskoti. Minnilutin heitir tó á landsstýrismannin og umsiting hansara um at arbeiða við at fyrireika og kanna møguleikarnar at yvirtaka loftrúm og flogferðslu.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Ein triði minniluti (Hervør Pálsdóttir og Aksel V. Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Stórar broytingar eru í ferð við at henda í loftferðslueftirliti um okkara leiðir. Bæði, tá tað kemur til sivila flogferðslu, men ikki minst í sambandi við hernaðar- og trygdarmál hjá stórveldum, tjóðum og altjóða felagsskapum um okkara leiðir.

Umsitingin av føroyska loftrúminum er í dag løgd til íslendskar myndugleikar at umsita. Ísland og Danmark hava avtalu um hetta, og tær inntøkur, tænastur og útreiðslur, ið eru av at umsita loftrúmið, fella til Danmarkar og til Íslands. Tað er eingin orsøk til hjá okkum at lata Danmark gera avtalur við onnur um okkara loftrúm. Tær avtalur eiga vit sjálvi at gera.

Vit kunnu eins væl sjálvi taka ræði á økinum og síðani hava okkara egna leiklut við samráðingarborðið. Á henda hátt vinna vit okkum samstundis innlit og vitan um, hvussu loftrúmið kann gerast eitt fakligt, tøkniligt og møguliga fíggjarligt tilfeingi fyri Føroyar.
Við at taka á okkum ábyrgdina og ræðið á loftrúminum kunnu vit eisini skapa vitanartung størv her í Føroyum og fígging til tilbúgving. Tað er eisini komið fram í nevndarviðgerðini, at tað eru stórir menningarmøguleikar fyri føroyska samfelagið og føroyskar førleikar at taka loftrúmið undir føroyskt løgræði og fyrisiting.

Hvørja ferð eitt flogfar flýgur í føroyskum loftrúmi, rinda tey eina ávísa upphædd. Hendan upphæddin fellur í dag til íslendskar og danskar myndugleikar. Sambært metingum liggur hendan upphæddin á umleið 70-270 mió. kr. árliga, og hetta fingu vit eisini váttað undir nevndarviðgerðini av serkønum. Hendan upphæddin kundi verið nýtt til at bygt okkara egnu førleikar upp og skapt fleiri arbeiðspláss, ið krevjast fyri at umsita loftrúmið: eftirlit, radaramyndir, search and rescue (SAR), radiosamskifti – og ikki minst at úbyggja teir førleikar, sum okkara egna flogvinna, flogferðsla og tyrlutænasta longu hava prógvað virðið á.

Tað hevur í fleiri førum verið lagt uppskot fram um at yvirtaka ella fyrireika yvirtøku av loftrúminum. Hetta er eitt mál, ið fleiri flokkar eru farnir til val uppá, og tað letur til, at stórur meiriluti er í Løgtinginum at fremja hesa yvirtøkuna. Loftrúmið er ikki eitt einfalt øki, men tað merkir ikki, at vit av teirri orsøk skulu steðga arbeiðinum at yvirtaka málsøkið. Hoyringarnar í Uttanlandsnevndini í sambandi við hetta uppskotið hava eisini verið positivar.
Við at yvirtaka loftrúmið vinna vit okkum altjóða støðu og royndir sum áhugaverdur samráðingarpartur –og vit kunnu fara undir at velja okkara egnu strategiir og loysnir til frama fyri føroyska samfelagið.

Í 1964 og 1977 fluttu vit fiskimarkið út og tóku ræði á og ábyrgd av okkara havi og fiskiríkidømi. Í 1992 yvirtóku vit tað, sum er undir okkum – undirgrundina; nú eiga vit eisini at yvirtaka tað, ið er yvir okkum – loftrúmið.

Við hesum viðmerkingum tekur hesin minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Uttanlandsnevndin, 23. apríl 2021

Bill Justinussen formaður	Brandur Sandoy næstformaður	Frimodt Rasmussen
Jaspur Langgaard	Aksel V. Johannesen	Hervør Pálsdóttir
	Annika Olsen	